# Todi dagsins maður i Parkini

**Føroyski landsliðsmaðurin skoraði fyrra FCK málið, var við í uppspælinum til hitt seinna og var sera eyðsýndur**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Leygardagin skal landsliðið spæla í Luksemburg. Heima á landi eru landsliðsspælararnir smátt um smátt við at koma í gongd við steypakappingini. Allir eru kortini greiðir yvir, at talan framvegis er um dystir, sum á ongan hátt eru fullgóð venjing undan stóru avbjóðingunum á altjóða leikpallinum.

Tí er tað serliga kærkomið hjá teimum á og kring landsliðið og hjá øllum fótbóltshugaðum føroyingum at frætta, at toppskjúttin, Todi Jónson, er heilt væl fyri.

Sunnudagin vitjaði OB í Parkini. FCK vann 2–1, og donsku miðlarnir eru ikki í iva um, hvør var mest eyðsýndi maðurin úti á vøllinum. Saman við fyrrverandi liðfelagnum, Karim Zaza, sum nú verjir málið hjá OB, var Todi einasti maðurin, sum fekk eitt tíggju tal, og onside var ikki í iva: føroyski landsliðsmaðurin kom á tað, sum teir rópaugens hold.

Hóvastákið kring føroyingin var ikki so undarligt. Todi Jónsson skoraði fyrra málið, hann var við í uppspælinum til 2–0 málið, og tað kom líka sum røringur í, hvørja ferð føroyingurin fekk bóltin.

Nýggi álopsspælarin hjá FCK, Heine Fernandez, var leikbannaður. Tí hevði venjarin gjørt av, at Zuma hesa ferðina skuldi mannað álopssessin undir liðini á Toda Jónsson. Teir báðir hava áður funnið væl saman í hugflogsríkum og snildum álops myndingum, og soleiðis var tað eisini hesa ferð.

Todi setti hol á í 1. hálvleiki. Thomas Thorninger legði bóltin inn um verjuna, Todi tamdi við høgra beini, áðrenn hann sera hegnisliga við vinstra beini lyfti bóltin upp um fyrrverandi liðfelagan Karim Zasa, sum nú verjir OB málið.

Tá Zuma økti, átti Todi sín lut í uppspælinum. Eftir innkast frá Niclas Jensen í vinstru, fekk Todi spælt til Zuma, sum sneiddi ein av, áðrenn hann skoraði. OB minkaði um munin, men teir hóttu ikki væl uppiborna heimasigurin, og tað líkaði teimum umleið trettan túsund áskoðarunum.

### Hugaligt

Málið hjá Toda var tað sjeynda hjá honum í hesum kappingarárinum. Harvið er hann komin upp á síðuna á Harald Brattbakk. Men norðmaðurin skorar ikki fleiri mál fyri FCK í ár, tí hann er fluttur til Rosenborg.

Todi Jónsson fegnast um, at FCK framvegis er við í toppstríðnum, og hann trívist væl í leiklutinum sum fremsti maður:

– Tað er hugaligt, tá tú beinanvegin kemur við í spælið. Eg haldi ikki, at eg hevði nakran annan upplagdan møguleika, enn tann, sum eg skoraði uppá. Har vóru onkrir hálvir møguleikar, men ikki meiri enn tað, sigur Todi Jónsson, sum ikki dylur, at tað kendist sum ein lætti at fáa mál:

– Tá tú ert fremsti maður, so verður roknað við, at tú skorar mál. Fært tú einki mál, so økist trýstið, og tú kanst rokna við, at venjarin fer at hyggja seg um eftir einum øðrum manni.

### Ståle og framtíðin

Danska pressan hevur gjørt nógv burturúr, at norski liðformaðurin hjá FCK, Ståle Solbakken, fyri einari viku síðani datt um undir venjing orsaka av hjarta stoppi. Hóast nógv hevur verið gjørt burturúr, so er tað merkisvert, at tað hevur ikki eydnast donsku pressuni at fáa liðfelagarnar hjá Ståle Solbakken at siga frá, hvussu teir upplivdu óhugnligu løtuna. Todi Jónsson var til venjing síðsta týsdag, tá dramatiski tilburðurin var, og hann heldur seg til somu linjuna sum liðfelagarnir. Tað vil siga, at hann hevur einki at siga um óhugnaliga tilburðin.

Tað hevur verið nógv tosað um, at framgongdin í FCK spælinum í hesum kappingarárinum komst av, at Ståle Solbakken er komin á miðvøllin.

– Sunnudagin gekk spælið so væl, sum tað ikki hevur gjørt í langa tíð. Men eg ivist ikki í, at tað fara at koma dystir, tá vit fara at sakna Ståle. Ikki minst næstu ferð, tá vit skulu spæla ímóti Brøndby á útivølli. Fyri okkum hevur tann dysturin avgerandi týdning fyri vánirnar at vera við í kappingini um DM, staðfestir Todi Jónsson, sum fegnast um nýggja málverjan, Thomas Myhre:

Hann hevði einar tvær rimmar bjargingar, og hann stýrdi verjuni sera væl. Tað hevði og fer ivaleyst at hava alstóran týdning fyri okkum.



*Tað boðar frá góðum fyri føroyska landsliðið, at Todi Jónsson rættiliga tykist hava funnið stórspælið fram nú*

# Rúni breyt beinið

**Í fyrsta dystinum fyri ÍF breyt nýggi málverjin beinið og skal nú hava beinið í gipsi í seks vikur**

SKAÐI
*Jóannes Hansen*

Ætlanin hevur verið, at Rúni Joensen skuldi vera málverji hjá ÍF í ár. Gøtumaðurin, sum umframt at hava spælt í barndómsfelagnum eisini hevur verið í NSÍ, var í málinum, tá ÍF spældi heimadyst í steypakappingini ímóti B68 sunnudagin. Men longu í 1. hálvleiki noyddist nýggi málverjin av vøllinum.

– Talan var um eitt hendiligt óhapp á hála vøllinum. Ein av B68 monnunum hevði stungið bóltin framvið málverjanum, men so gleið hann, og teir brustu saman. Rúni hevði nógva pínu, læknin kom á staðið, og tað varð staðfest, at talan var um brot nakað omanfyri øklaknútin. Boðini vóru, at beinið skal liggja í gipsi í seks vikur. Tað var sera óheppið hjá Rúna, heldur Pauli Jarnskor, sum er nýggjur venjari í Fuglafirði.

Miðvallarin Mortan Thomsen fór í málið at standa, tí ÍF hevði ongan eykamálverja. Allan Joensen, sum var annar av málverjunum hjá ÍF í fjør, verjir nú málið hjá LÍF.

Tá vit spyrja Paula Jarnskor, hvør nú verður málverji hjá ÍF, svarar hann, at tað veit hann ikki rættuliga:

– Eingin annar málverji hevur verið til venjngar, men tann spurningin mugu vit fáa eina loysn á nú beinanvegin.

Erling Joensen hevur verið besti málverjin í Fuglafirði í fleiri ár. Hann siglir, men í fjør var hann málverji, tá hann var heima. Ivaleyst fara Pauli Jarnskor og hinir í ÍF at vita, hvussu tað er við siglingini og frítíðini hjá Erlingi Joensen, áðrenn teir fara aðra staðni at leita eftir málverja.

Tað ber ikki til at siga, nær Rúni Joensen aftur verður tøkur ímillum stólparnar. Tað verður komið út um krossmessu – 3. mai – áðrenn gipsið verður tikið av. So skal beinið venjast í nakrar vikur, áðrenn hugsningur kann verða um fótbóltsvenjing. Tí er tað neyvan serliga stórt sannlíki fyri, at nýggi ÍF málverjin verður at síggja á liðnum í nógvum dystum undan summarsteðginum. Men nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at taka seg upp.


*Rúni Joensen, sum her sæst verja NSÍ-málið, hevur fingið eina sera óhepna byrjan upp á kappingarárið*



ÍF–B68 1–2

# Nýggj andlit í B68

**Umstøðurnar gjørdu, at tað var torført at spæla, tá ÍF hevði heimavøll í Gøtu**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

Viljin at fáa fyrstu oyggjauppgerðina frá hondini var stórur. ÍF og B68 gjørdu heimadystin hjá fyrr nevnda felagnum burtur av sær sunnudagin, men tey spældu ikki í Fuglafirði.

Tá tað var komið fram ímóti dystartíð, var heimavøllurin hjá ÍF hvítur. Tí varð avgjørt at fara um Varmakeldueið og at spæla í Gøtu, har tað ikki var hvítt, tá dómarin bríkslaði fyrstu ferð. Men tað var skjótt, at umstøðurnar vórðu soleiðis, at tað gekk út yvir spælið.

B68 vann 2–1. Øll málini komu í 1. hálvleiki, og toftamenn høvdu skorað tvær ferðir, áðrenn heimaliðið svaraði aftur.

Tveir av trimum landsliðsmonnum hjá B68 skoraðu málini. Øssur Hansen setti hol á, eftir at hann hevði drigið úr høgru og inn á brotsteigarmarkið, og Fróði Benjaminsen økti, eftir at Marlon hevði spælt skrátt út frá baklinjuni í høgru.

ÍF málið kom eftir útspæl frá B68 málverjanum. Temjingin hjá Marloni miseydnaðist fullkomuliga, og Heini Heinason takkaði fyri, tá hann gjørdist leysur.

### Fleiri nýggir

Hjá heimaliðnum var Rúni Joensen í málinum, inntil hann noyddist av vøllinum við brotnum beini. Tá fór miðvallarin Mortan Thomsen í málið at standa. í trímanna verjuni vóru Tomek, Torstein Joensen og Viggo Johannesen. Á miðvøllinum vóru Eyðolvur Petersen, Roy Róin, Mortan Thomsen og Høgni Zachariassen. Á toppinum vóru Høgni á Lakjuni, Heini Heinason og Eyðun Ryggshamar.

Bárður á Lakjuni, sum aftur hevur verið plágaður av skaða, kom inn, men noyddist av aftur vøllinum. Hanus Eliasen og Árni Petersen vórðu eisini skiftir inn.

Hjá B68 vóru – sammett við í fjør – fýra nýggj andlit at síggja: Hans Fróði Hansen, Arnold Joensen, John Heri Dam og Messias, sum var á Toftum í fyrraárið.

B68 liðið sá soleiðis út: Magnus Poulsen – Marlon, Jan Petersen, Hans Fróði Hansen, Messias – Arnold Joensen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, John-Heri Dam – Súni Fríði Johannesen, Øssur Jacobsen. Í 2. hálvleiki komu Bogi Petersen, Jann Ingi Petersen og Marcello inn. Jan Dam og Jákup Eli Olsen fara ivaleyst at vera við í kappingini um plássini. Teir hava báðir verið skaddir, men eru so smátt farnir undir aftur venjingina.


*Hóast teir bitu nakað frá sær, so eydnaðist ikki fuglfirðingum at taka stig frá B68*

# Herfølge uppaftur verri fyri

Frástøðan upp til hinibotnliðini øktist, tí AGF vann á heimavølli ímóti botnproppinum

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Tað er heilt øðrvísi og nógv minni hugaligt at siga frá gongdini hjá Herfølge í ár, enn tað var fyri einum ári síðani. Fyri einum ári síðani tóku Jákup Mikkelsen og liðfelagarnar vikuskifti eftir vikuskifti allan tann danska fótbóltsheimin og meiri afturat av bóli. Í ár gongur minni væl, og sunnudagin varð tað enn eina ferð staðfest, at tað skal nógv til, áðrenn skútan verður bjargað.

Silkeborg er oddalið í superliguni, og tí var tað ikki óvæntað, at teir fóru úr Herfølge við øllum stigunum. Úrslitið var 2–0. Fyrra málið fingu teir beinleiðis upp á fríspark. Í sjónvarpinum tóktist tað, sum Jákup so at siga hevði fingið tak á bóltinum, sum kortini vór í málið:

– Eg helt, at eg hevði tak á støðuni. Aftaná iðri eg meg um, at eg ikki beindi bóltinum út um stólpan í staðin fyri at royna at halda honum, sigur Jákup Mikkelsen. Hann er altíð sera kritiskur við seg sjálvan, men ger – sær sjálvum líkur – einki burturúr, at hann beint undan málinum hevði eina kanón bjarging, tá ein royndi eg úr fimm metrum.

Seinna málið kundi føroyski landsliðsmálverjin ikki gera so nógv við. Tríggir verjuspælarar og tveir álopsspælarar vóru um bóltin, tá hann kom innfyri úr høgru. Tað tóktist sum um ein av verjuspælarunum skuldi beina bóltin burtur, men so kom ein av álopsmonnunum ímillum og økti til 2–0.

### Skaðastova

Herfølge hevði fleiri málmøguleikar, men teir megnaðu ikki at fáa bóltin innum Peter Kjær, sum er annar av málverjunum í danska hópinum til landsdystin ímóti Kekkia leygardagin.

– Vit hava trupulleikar at umseta møguleikarnar til mál. At vit hava so nógvar spælarar á skaðalistanum ger ikki støðuna hugaligari, heldur Jákup Mikkelsen og sipar harvið til, at átta av spælarunum, sum í fjør vóru í 1. liðs hópinum, eru skaddir.

Støðan hjá Herfølge í botninum í superliguni gjørdist ikki betri av, at AGF, sum er annað av liðunum, ið Herfølge vónar at fáa aftur, vann fekk trý stig. AGF vann 1–0 á botnliðnum úr Haderslev, sum longu tykiast hava tikið patent upp á annað niðurflytingarplássið.

– Teir báðir næstu dystirnir verða sera týdningarmiklir fyri okkum. Fyrst skulu vit spæla á útivølli ímóti AB, og so fáa vit vitjan av Haderslev. Um vit skulu bjarga okkum, so mugu vit vinna báðar hesar dystirnar, heldur Jákup Mikkelsen, sum í summar fegin vil siga farvæl við eitt felag í superliguni.

AB spældi í gjárkvøldið á útivølli ímóti FC Midtjylland. Brøndby vann sunnudagin 3–1 á útivølli í Viborg. At Vibog tapti hevði við sær, at FCK legði seg undir liðina á teimum. Lyngby megnaði ikki meiri enn 0–0 á heimavølli ímóti AaB.

Komandi vikuskifi er HM undankapping á skránni kring alt Europa. Tá verður ikki spælt í superliguni. 21. umfarið verður annað vikuskifti.

### Støðan, danska superligan

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 20 | 10 | - | 8 | - | 2 | 32 | 24 | 8 | 38 |
| 2 | Brøndby | 20 | 11 | - | 3 | - | 6 | 50 | 26 | 24 | 36 |
| 3 | Lyngby | 20 | 11 | - | 2 | - | 7 | 33 | 33 | 0 | 35 |
| 4 | FCK | 20 | 9 | - | 7 | - | 4 | 33 | 18 | 15 | 34 |
| 5 | Viborg | 20 | 10 | - | 4 | - | 6 | 35 | 21 | 14 | 34 |
| 6 | FCM | 19 | 8 | - | 6 | - | 5 | 32 | 28 | 4 | 30 |
| 7 | OB | 20 | 9 | - | 2 | - | 9 | 32 | 26 | 6 | 29 |
| 8 | AaB | 20 | 7 | - | 6 | - | 7 | 29 | 31 | -2 | 27 |
| 9 | AGF | 20 | 7 | - | 2 | - | 11 | 28 | 38 | -10 | 23 |
| 10 | AB | 19 | 4 | - | 7 | - | 8 | 26 | 29 | -3 | 19 |
| 11 | Herfølge | 20 | 4 | - | 5 | - | 11 | 23 | 42 | -19 | 17 |
| 12 | Haderslev | 20 | 1 | - | 4 | - | 15 | 19 | 56 | -37 | 7 |



*Tað gongst sera striltið hjá danska meistaraliðnum, sum nú er í alstórum vanda fyri niðurflyting*